# Autismufelagið skipar fyri fyrilestrarøð við Louise Egelund Jensen og Pia Lindberg Fenger

**8. - 11. mai 2023**

Autismufelagið

Autismufelagið

# Autismufelagið skipar fyri fyrilestrarøð

**8.**
mai 2023
kl 19.00- 21.30

## Løkshøll í Runavík

19.00-20.15 Louise Egelund Jensen: **Det jeg kan (og hvordan jeg lærte det)**
20.15-20.30 Steðgur
20.30-21.30 Pia Lindberg Fenger: **Eksekutive funktioner, hvordan hjælper vi med den rette støtte og struktur**

**10.**
mai 2023
kl 19.00- 21.30

## Mentunarhúsið í Fuglafirði

19.00-20.15 Louise Egelund Jensen: **Autisme og følelser**
20.15-20.30 Steðgur
20.30-21.30 Pia Lindberg Fenger: **Autisme og empati**

**11.**
mai 2023
kl 19.00- 21.30

## Norðurlandahúsið í Havn

19.00-20.15 Louise Egelund Jensen: **Stress, set indefra**
20.15-20.30 Steðgur
20.30-21.30 Pia Lindberg Fenger: **Autisme og stress**

Autismufelagið

# 8. mai 2023 kl 19.00-21.30
# í Løkshøll í Runavík

**kl 19.00-20.15 Louise Egelund Jensen**

## Det jeg kan (og hvordan jeg lærte det)

Fyrilesturin er uml 1 tíma og vendir sær mest til fakfólk og avvarðandi, tó kunnu fólk við autismu eisini fáa okkurt burturúr.
Diagnosukriteriini fyri autismu, og harvið eisini stórur partur av fakbókmentunum, er um at lýsa tað fólk við autismu *ikki* megna. Og sjálvt um vit longu eru byrjað at síggja eitt rák við fokus á styrkir heldur enn veikleikar, so eru vit als ikki komin nóg langt enn, so leingi miðlarnir, og enntá onkrir læknar, enn lýsa autismu sum eina sjúku.
Við hesum fyrilestri vil eg fegin greiða frá ymsum eg faktiskt megni, bæði tað viðfødda og okkurt av tí eg havi lært - og eg fari at royna at greiða frá, hvussu eg lærdi tað, og hvat skuldi til, so eg kundi læra tað.
Eg ynski at greiða frá hesum við vón um at geva eina fatan av, hvat kann motivera og inspirera, hvussu nøkur ting kunnu lærast, meðan onnur ikki kunnu, hvussu nógv ein, at síggja til, simpul uppgáva onkuntíð krevur av mær, og fyri at geva eina djúpari fatan av, hvat vit kunnu undir røttu umstøðunum.
Eg fari m.a. at greiða frá hesum evnum: At búgva í egnum bústaði, minnið (hukommelsen), feriur, sjálvsfatan og sjálvsinnlit, meining.

**kl 20.15-20.30 Steðgur**

**kl 20.30-21.30 Pia Lindberg Fenger**

## Eksekutive funktioner, hvordan hjælper vi med den rette støtte og struktur.

Gjøgnumgongd av útinnandi virkisføri (de eksekutive funktioner), hvønn týdning hevur tað fyri fólk við autismu/autistar, at tað kunnu vera avbjóðingar við at skipa virksemi (aktiviteter), uppgávur, tíð og arbeiðsgongdir, og hvussu vit sum foreldur og fakfólk kunnu stuðla, so øll menna sjálvbjargni og fáa so góða lívsgóðsku sum møguligt.
Fyrilesturin verður eitt framhald av fyrilestrinum hjá Louise, við eini fakyrkisligari áskoðan.

Autismufelagið

# 10. mai 2023 kl 19.00-21.30
# í Mentunarhúsinum í Fuglafirði

**Kl 19.00-20.15 Louise Egelund Jensen**

## Autisme og følelser

Fyrilesturin er uml 1 tíma til 5 korter og vendir sær mest til fakfólk og avvarðandi, tó kunnu fólk við autismu eisini fáa okkurt burturúr.
Autistar hava onki ella bara lítið empati. Autistar kunnu ikki elska. Autistar eru sera rationellir og ofta kenslukaldir.
Allar hesar 3 fordómar havi eg møtt meira enn eina ferð í lívinum. Og tann um empati, enntá í fleiri fakyrkis-bókmentum um autismu.
Sjálvt um eg síggi meg sjálva sum eitt sera hugsandi menniskja, havi eg ongantíð sæð meg sjálva í lýsingini av autistum, sum menniskju við avmarkaðum kenslulívi.
Tvørturímóti! Eg føli við so stórari styrki um "kompleksitet", at eg ofta verði yvirtikin av kenslum (overvældet) og næstan ikki kann vera í verðini.
So, hvar koma fordómarnir, um okkara avmarkaða kensluliv, frá?
Hvussu følist tað í veruleikanum at vera autist/ur? Og hvussu kann eg sum autist/ur handfara vreiði, vónbrot, eydnu, stoltleika, einsemi og empati, og allar hinar nógvu kenslurnar eg upplivi, uttan at fara um koll?
Tað vil eg royna at koma inn á í hesum fyrilestrinum, í vónini um, at vit saman kunnu fyribeina fordómunum.

**kl 20.15-20.30 Steðgur**

**kl 20.30-21.30 Pia Lindberg Fenger**

## Autisme og empati

Gjøgnumgongd av teori um empati/ kenslur og autismu.
Fyrilesturin verður eitt framhald av fyrilestrinum hjá Louise, við eini fakyrkisligari áskoðan.

Autismufelagið

# 11. mai 2023 kl 19.00-21.30 í Norðurlandahúsinum í Havn

**kl 19.00-20.15 Louise Egelund Jensen**

## Stress, set indefra

Fyrilesturin er uml 1 tíma til 5 korter og vendir sær mest til fakfólk, tó kunnu avvarðandi og fólk við autismu eisini fáa okkurt burturúr.

Eg fari at greiða frá, hvussu stress kennist hjá einum við autismu. Eg fari at koma við ítøkiligum dømum um, hvat stressar meg og royna at greiða frá, hví. Eisini fari eg at koma við dømum um, hvat eg sjálv geri, og hvat onnur kunnu gera fyri at hjálpa, tá eg eri stressað. At enda vil eg eisini, við hjálp frá "Hejlskov/Uhrskov´s stressmodel" vísa, hvussu man við strukturi og góðari planlegging, ofta kann sleppa undan at stressstøðið verður ov høgt.

Tað verður møguligt at seta spurningar eftir fyrilesturin.

**kl 20.30-21.30 Pia Lindberg Fenger**

## Autisme og Stress

Hvussu kann arbeiðast við at minka um stress.

Ov høgt stress-støði í dagligdegnum gevur ofta verri lívsgóðsku og kann føra til samanfall (nedsmeltninger).

Í hesum fyrilestrinum verður dentur lagdur á ítøkiligar mátar at minka um stress-støðið í dagligdegnum og geva betur lívsgóðsku. Við «forudsigelighed», tryggleika, strukturi, og fatan (forståelse) fyri sansaligum (sensoriske) trupulleikum.

Fyrilesturin verður eitt framhald av fyrilestrinum hjá Louise, við eini fakyrkisligari áskoðan.

Tað verður møguligt at seta spurningar eftir fyrilesturin.

**kl 20.15-20.30 Steðgur**

Autismufelagið

# Eitt sindur um fyrilestrarhaldararnar



Eg eiti **Louise Egelund Jensen**, eri fødd í Bogense (á Fyn) í 1981 sum dóttir nr 2 hjá bussføraranum, Børge, og námsfrøðinginum, Susanne. Eg vaks upp úti á landinum, tætt við náttúruna og djór, og djór hava eisini altíð havt ein stóran leiklut í mínum lívi, bæði sum áhugamál, arbeiði, og sum vinir, og tað vóru eisini tey eg kundi fara til við øllum.

Tá eg var 17 ár fekk eg diagnosuna Asperger's Syndrom (á autismuspektrinum). Hetta var eftir langa tíð við etingarólagi og fleiri árum við depressiónum og øðrum trupulleikum.

Tað var ein stórur lætti fyri meg at fáa diagnosuna og svar uppá allar teir spurningar, eg hevði havt alt mítt lív. Tá eg var 20 ára gomul fekk eg búpláss á "bofællesskabet Asgaard", eitt fyribils tilhaldsstað fyri vaksin við Asperger's Syndrom, har tey kunnu koma at læra, tað tey hava brúk fyri áðrenn tey flyta í egnan bústað. Eg búði á Asgaard í 2½ ár, áðrenn eg flutti i egna íbúð í Fredericia. Tað var á Asgaard, at eg fyrstu ferð nevndi, at eg ynskti at halda fyrilestur fyri øðrum í somu støðu, og tað vóru starvsfólkini á Asgaard, sum gjørdu tað møguligt hjá mær at føra hetta ynskið út í lívið.

Eg arbeiði sum hjálparfólk nakrar fáar tímar um vikuna hjá "Favna Erritsø Dyreklinik", og so gangi eg túr við 2 hundum, umframt mínum egna hundi. Eg venji fleiri ferðir um vikuna og eri eldhugaður rennari. Eg havi runnið fleiri hálvmaraton og enntá eitt einkult maraton. Eg njóti teir nógvu tímarnar einsamøll á landavegnum í mínum renniskóm! Í frítíðini dámar mær at taka myndir, arbeiða í havanum og at ganga túr við hundi mínum Bodil. Eg elski tónleik, at lesa góðar bøkur og at hyggja at filmi.

Eg eiti **Pia Lindberg Fenger** og eg arbeiði sum námsfrøðiligur ráðgevi við serkunnleika innan autismu og aðrar hjádiagnosur.



Eg havi síðan 1996 arbeitt innan brekøkið, har eg havi valt at serútbúgva meg innan autismu. Eg arbeiði við fólki við autismu (autisme spektrum forstyrrelser) og havi royndir við bæði børnum og vaksnum á øllum autismuspektrinum. Eg havi eisini ognað mær førleikar innan ymsar hjádiagnosur. Tað kann t.d. vera angist, depressión, OCD, stress, etingar-ólag, kynslív og svøvnórógv. Eg arbeiði miðvíst við at økja um lívsgóðskuna og at betra sjálvbjargni hjá barninum/tí vaksna við diagnosu. Eg arbeiði út frá "Neuropædagogisk tilgang" og "Low Arousal", "LA2", og brúki "TEACCH" meginreglurnar til strukturering og stuðul í dagligdegnum.

Autismufelagið

www.autisma.fo

autisma@autisma.fo

509 031

facebook.com/autismufelagid